# Dimmalætting

Stovnað 1878
*Ábyrgdarhlaðstjóri*
Beate L. Samuelsen
*Blaðstjóri*
Georg I. Petersen
*Ugeavsir*
P/F Dimmalætting
*Prent:* Dimmalætting

AVGREIÐSLA Mánad. til hósd. kl. 8.00-17.00. Frúggjad. kl. 8.00-16.00. Leygard stongt. Til.-avgreiðsla kl. 8.00-16.00
Tlf: 311212. Fax: 310941. Smyrilsvegur 13, Postbokk 19, FO-110 Torshavn
*e-mail:* redaktion@dimma.fo, prent@dimma.fo, lysingar@dimma.fo, baldur@dimma.fo, beklad@dimma.fo, kunnk@dimma.fo, vidarkm@dimma.fo



**INNLATINGARFREIST FYRI LÝSINGAR**

| | Tvsdags-blaðið | Mikudags-blaðið | Hósdags blaðið | Frúggudags-blaðið | Lívg dags blaðið |
|---|---|---|---|---|---|
| Stórn lýsingar | fr. kl. 12 | mán. kl. 12 | tys. kl. 12 | mik. kl. 12 | hós. kl. 12 |
| 2 og tekstlýsingar | má. kl. 10 | tys. kl. 10 | mik. kl. 10 | hós. kl. 10 | fr. kl. 10 |
| Okkars Gulu | fr. kl. 15 | | tys. kl. 15 | | hós. kl. 15 |

Lýsingar, ið nógv arbeiði er av, mugu vera inn í góðan tíð
Latlýsingar og lýsingar við framhjápláss skulu bileggjast í góðari tíð

**Vanligur treytir:** Síðustódd: 8 teigar á 41x515 mm. 1/1 síða 4.160 mm. Utajónd Lýsingar sum eftir blaðsins meti kunnu mistakast fyri blaðulfar, skulu merkjast við ordnum: Lýsing, sum verður roknað uppi lýsingarmátið. Orðið INSEKAT verður ikki góðtikið. Innlatingarfreist fyri lýsingar: Sæst á skemanum til vinstru

**Fyrivarni:** Innihaldið í lýsingunum eru ikki stríðs móti galdandi lógum. Ábyrgd ina fyri hesum hevur lýsarin. Blaðið tekur sær rætt til at nýta at taka lýsingar við, sum blaðið metir ónýktar

Teknisk viðurskifti og umhugsan fyri lesarum og lýsarum ger, at blaðið má tilskila sær rætt til at
1. gera smærri týdningarleysar broytingar í lýsingum hvat teksti og uppsetan viðvíkur
2. skjóta út eina lýsing til seinni blað

Latlýsingar kunnu bert takast við, um teknisku viðurskiftini loyva tað

Endurgald fyri øguligar villur, sum lýsarin sjálvur ikki hevur skyldina fyri, er vanliga prísavláttur eftir blaðsins meti um virðisminkan av lýsingini, men í mesta lagi at lýsingin, ella liknandi lýsing, verður tikin við aftur seinni ókeypis. Villur, sum stondast av vánligum lýsingartilfari hevur blaðið onga ábyrgd av

Lýsingar, sum verða innlatfonaðar, verða altid lunar uppaftur, og blaðið tekur til onga ábyrgd fyri villur, sum koma á henda hátt


## *Gullfepur og fullveldi*

Løgtingið hevur talað, og við einum greiðum meiriluta fer samgongan við hjálp frá Miðflokkinum at fyrireika fullveldið Føroyar. Átjan tingmenn atkvøddu fyri, tólv ímóti, og so var tann sakin úti av verðini. Nú er tað upp til almenna skrivstovuveldið at manna nakrar arbeiðsbólkar, sum skulu greiða okkum frá, hvussu vit fara at hava tað sum føroyingar eftir lovsingina. Einki við at kanna møguleikarnar við einum nýggjum samstarvshátti við Danmark. Nei. Tað hevur samgongan longu avgjørt. Hetta tykist sum ein eitt sindur øvugt mannagongd.

Tað plagar at vera vanligt fyrst at hyggja eftir avleiðingunum av eini ætlaðari gerð, og síðan gera av, um hon skal gjøgnumførast. Mannagongdin hjá landsstýrinum minnir um eina roynd at byggja eitt skip úr glasi fyri nógvan pening, seta fólk umborð, og so líka vita um tað nú fer at halda, tá tað fer av bakkastokki. Synd og keðiligt um okkurt hendir, men vakurt og stásiligt um tað ber til. Tað er við einum tilíkum hugburði at spæligreðingurin setir seg við roulettina. Antin vinnur hann alt, ella missir hann alt. Flest dømi eru um tað seinasta, og í dag finnast viðgerðastovur fyri tilík fólk, sum ikki duga at sígga álvarsligu avleiðingarnar av sínum spæli.

Fullveldisfepurin hevur rættiliga fingið vind í seglini, síðan dreymurin um oljumilliardirnar gørdist veruleiki í 90-unum, mitt sum ringast stóð til her á klettunum. Tað var funnin fressur hjá tjóðveldismonnunum, og teir byrjaðu veruliga at koyra á loysingartosið, kryddrað við orðunum fullveldi og eini skiftisskipan. Tað hjálpti eisini væl til, at danski forsætisráðharrin, sum hevði syrgt fyri at danir yvirtóku uttanlandsskuldina, á ein sera óhepnan hátt viðgjørdi trupulleikarnar í Føroyum. Hann var hástórur, niðurlátandi og stoytti bensin á bálið. Hann var sum ímyndin av søguliga danska embætismanninum, sum ikki virdi føroyingar tað minsta, og økti um fjarleikan millum londini bæði.

Tað paradoksala í øllum hesum er, at loysingaflokkarnir seinastu nógvu árini hava sagt, at blokkin kundu vit gott verið fyriuttan. Tað var ikki ein spurningur um pengar. Serliga Tjóðveldisflokkurin koyrdi hesa linju, og tí var stuttligt at lesa grein hjá løgtingsformanninum í blaðnum í gjár. Har vísir hann á, at nú handlar tað um pengar – oljupengar, sum koma ístaðin fyri blokkpengar, so at nú hava vit einki at vera bangin fyri. Hetta var júst tað, sum eftir øllum at døma vendi føroyingnum á seinasta løgtingsvali, so hann atkvøddi fyri loysingarflokkunum. Lítið framskygt má sigast, tí oljupengarnir fáa júst somu støðu sum blokkurin í føroyska búskapinum. Men oljupengarnir, sum multinationalar fyritøkur skulu pumpa upp til okkum, eru eftir øllum at døma reinari pengar enn teir donsku blokkpengarnir. Tjóðveldisflokkurin hevur í síni sjarmuherferð ásannað, at vit kunnu ikki kvetta á stokkinum, men heldur niðurtrappa blokkin spakuliga. Tað verður neyvan nøkur spakulig politisk niðurtrapping, tá oljan einaferð er uppi. Tá sita vit eftir við pínuni frá stokkutari gleði.

## Andlát og tøkkir

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra móðir, vermødir, omma, langomma og oldurmorna

***Valborg Kjærbæk***
ættað úr Sumba, fødd Kjærbo

andaðist á Lágargarði 4.10.98, 94 ára gomul. Kistan fer frá Lágargarði leygardagin 10.10. kl. 14.00. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum sunnudagin 11.10. kl. 14.00. Sálmabókin verður nýtt.

Familjunnar vegna
*Nicolina og Jacoba*

### Tøkk

Hjartaliga takk fyri samkensla og hjálp, tá kæra systir okkara

***Jóhanna Maria Djurhuus***

doyði og varð jarðað.

Fam. vegna
*Málfrid og Egil*

### Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, ið á ymiskan hátt mintust meg á 85 ára føðingardegnum tann 8. september 98.

Heilsan
*Jóhanna Andrea Durhuus*
Vestmanna

### Tøkk

Vit vilja hjartaliga takka tykkum, sum gjørdu heimkomuna av silvurbrúðleypsferð okkara ogloymandi. Eina tøkk til familju, starvsfelagar, vinir og grannar fyri gávur, blómur og fjarrit
Hjartans tøkk øll somul.
Harrin signi tykkum.

*Sigga og Mikkjal*

## Brøv

### Var tað nú HB, sum gjørdist føroyameistari í 1998?

Hetta er spurningur, sum mong seta sær. Hígartil hevur tað verið so, at síðani 1942 hevur verið spælt um føroyameistaraheitið millum áhugafeløg, sum í longri og styttri tíð hava funnist á bygd eina og í Havnini. Men í ár kom í Havn nýtt fótboltstiltak, sum eitur p/f HB við vinnulivsmonnum og øðrum og eru tað hesir, sum foru við sigrinum í ár. Sostatt halda vit, at tað er hetta partafelag, sum hevur vunnið sitt fyrsta føroyameistaraheiti í 1998 og ikki HB, sum í aðru deild við einum máli gjørt burgsáti sær undan niðurflyting í 3. deild.

Tí halda vit, at um hetta partafelag, p/f HB, framhaldandi skal sleppa at spæla um nakað heiti innan føroyskan fótbólt, so ma tað biða, til tað finnur ein mótspælara, eitt annað føroyskt fótboltspartafelag at spæla imóti, annars verður kappingin undir ongum umstøðum «fair play».

Er tað tí ein áheitan á ÍSF at umhugsa, um tað var rætt, at geva hesum partafelag ferðastreypið í ár og eisini at viðgera, hvat gerast skal við hetta partafelag innan samtakið. Rættast var kanska, at hetta p/f roynir at sleppa sær inn í onkra superligu uttanlands.

**fótbóltsáhugaðir**

### Fótbóltur og ítróttarskrivarar

Tað kemur mær fyri, sum um tað bert er onkur hissini persónur, sum ætekur sær at skriva ítróttarsiðuna í Dimmu.

Ein, sum kallar seg Rúnar Reistrup, skrivar um dystin millum ÍF og HB.

Eg fari at biðja Runar um at verða eitt sindur meira objektivan, um hann ætlar at verða journalistur í framtiðini.

Eg eri heilt samdur við tær um, at ÍF ikki spældi sum eitt 1. deildarlið henda dagin, men tá tú skrivar um, at vit hava eitt ár fyri framman, har liðið er í eini deild, tað ikki hoyrir heima í, og tískil fer bank í umleið trimum út av hvørjum fýra dystum, skilji eg tað, sum um tú ert í einum HB rúsi og ikki veitst, havt tú skrivar um.

ÍF hevur sum øll hini liðini spælt 18 dystir. Vit hava tapt 9. So nú kanst tú seta teg niður og rokna, um vit hava fingið bank í trimum ut av fýra.

Eg kann eisini senda tær eina tabell við øllum dystunum og domaraseðlarnar, um tú vilt, so kanst tú sigga, at vit hava tapt fýra dystir við meira enn einum máli, tað vil siga, at hinir fimm eru taptir við einum máli. Í tveimum vil eg ganga so langt og siga, at vit fingu bank. Teir eru B36-ÍF=7-2, ÍF-HB=1-10. Í 5 av teimum 8 jønvu dystununi voru vit framman fyri, til tað restaði 4 min, 3 min, 1 min, og onkuntíð bleiv javnað í yvirtíðini. Sanniliga smáir marginalar milluin succes og fiasko. Men tað var ÍF og eingin annar, sum slapp sær undan niðurflyting. Hvør heldur tú hevur givið okkum 11 stig? Tað er so nógv annað eg kundi hugsað mær at trivið í, men eg gern tað ikki nú.

Eg vil at enda ynskja HB hjartaliga tillukku, og takka fyri arið, sum for. Tit vóru heilt vist tað besta liðið í ár. Vónandi verður tað ein meiri objektivur ítróttarskrivari á Dimmu næsta ár.

Vinarligast
Sum liðleiðari hjá ÍF í ár

**Símin Fornagarð**

## Brøv

### Øll børn hava somu rættindi

Eg var herfyri á fundi við foreldrafelagið, sum umboðar tey børn, sum eru uppskrivað til vøggustovu og barnagarð, og framvegis standa á biðlista. Trupulleikin er stórur fyri hesi foreldur, sum arbeiða. Børnini verða ansað av fleiri, alt skal passa saman, og tað merkist týðiliga ein otrygglei. Tað er í hesum sambandi, at hugsanin kom inn á ST-sáttmálan, sum umfatar rættindi hjá børnum.

Hesin ST-sáttmáli er settur saman av 54 greinum. Har stendur, at barnið hevur rætt til sosialan tryggleika, egið mál, menning, mentan og identitet.

Í grein 2 stendur, at øll børn hava somu rættindi og eru lika nógv verd. Eingin mismunur má verða gjørdur.

Í grein 3 stendur, at tað besta altið eigur at vera fremst í huganum, tá hugað verður um barnið.

Í grein 31 stendur, at barnið hevur rætt til spæl, hvíld og frítíð.

Eg skal ikki á hesum sinni koma inn á fleiri grenir, men bert minna lands- og kommunalpolitikarar á henda ST-sáttmála.

Vinarliga

**Carita Björklund**
formaður
í Føroya Pedagogfelag

## Orðið

*Les 5. Mósebók 6, 1-9*

**ÓTTI, KÆRLEIKI OG ÆRLIGLEIKI**

*Tú mást ikki stjala. Tú mást ikki bera rangan vitnisburð móti næsta tínum.*
*-5 Mósebók 5, 19-20*

BYGDARLAGIÐ. Addielou liggur á krossvegi, men er ov lítið at merkja á landkortið. Men har er ein baptistakirkja, ein mathandil og ríkiligt av reiðiligleika. Ein bóndi rekur matsølubúðina; hann letur upp umleið klokkan 7 á morgni og rymir sjálvum un nóntíð, tí tá fer hann at ambæta neytunum hjá sær, men hann letur sølubúðina standa opna til sjálvtøku hjá fólki. Alt, hann krevur, er, at tey skriva á pappírsblokkin á hurðini tað, ið tey fara við og vátta við undirskrift sínari. Tey kunnu so gjalda seinni – og tað gera tey.

Flestu handlar fáa ikki gjørt so. Men í Addielou, jú, har virkar reiðiligleiki. Hví? Partvís tí at tað millum Boyd og grannarnar valdar áltið sterka. Men eg haldi, djypri grund er hon, at kærleiki teirra til Gud eigur í sær heilnæman ótta fyri Honum. Fólk, sum av sonnum óttast og elska Gud, læra at líta á hvørt annað og royna ikki at lumpa hvørt annað. Í teim Tiggju Boðunum greipaði Móses teir saman – ótta fyri og kærleikan til Gud (5. Mósebók 6, 1-5), har tvey teirra forbjóða at ljúgva og stjala (5, 19-20). Hesar báðar lógirnar eru grundstøðið undir áliti í samskifti manna millum. Tað er sjálvandi fáfongt at hava álit á einum og hvørjum. Men vísa vit okkum sjálv álitisverð og ærlig, fara menniskju at varnast, at tað at óttast og elska Gud slóðar fyri tryggari heimi. Og tað ynskja vit øll

© -prp-

## Viðmerkingar

*Fyrispurningur til Heðin Mortensen:*

# Hvussu kunnu Føroyar fáa olympiska viðurkenning, uttan at vit eru eitt fullveldi?

-Brennidepilin- í vikuskiftissendingini hjá utvarpi Føroya er sloftast sera ahugaverður, og hann var tað ikki minni, tá ið ÍSF-forsetin Heðin Mortensen var gestur í útvarpsstovuni figgadagin í farnu viku!

ÍSF-forsetin hevur alt rós uppbornð fyri strembanina at útvega Føroyum limaskap í altjóða olympiska ráðnum I.O.C. – og í hesum sambandi yntski eg at stilla Heðini Mortensen ein fyrispurning: **Hvussu kunnu Føroyar gerast limir í I.O.C. tá øll hini limalondini í I.O.C. eru suverinir statir og ella sjálvstøðug lond?**

Sum spaniumaður (og gamal Franco-stuðul!) sær Antonio Samaranch, I.O.C.-forseti neyvan sørvisi uppá Danmork kontra Føroyar, enn hann sær uppá Spaniu kontra Bakaralandið!

Tí er sera ivasamt at Samarach letur olympiska grindina upp fyri Føroyum við núverandi ríkisrættarligu støðu Føroya móttvegis Danmark.

Annars hevur Liechtenstein vunnið bæði gull og silvur á olympiskum vetrarleikum, ikki sum sveitsiskt heimastýri, men sum suverenur statur – fyri at nevna eitt dømi í føroyskari stødd!

Vinarliga
**H.Á. Simonsen**

P.S. Annars kunnu vit bert takka søguligu rættindunum hjá Skotlandi, Wales og Norður-Írlandi, sum annekteraðar tjóðir í United Kingdom (Bretlandi) fyri at vit eru limir í FIFA og UEFA.

Fyrst í nítiarunum var uppskot frammi um, at Bretland bert skuldi hava eitt landslið í FIFA-hópi, tí Skotland, Wales og Norður-Írland voru ikki sjálvstøðug lond, tíbetur fall hetta uppskotið, annars høvdu vit óivað eisini farið út í myrkrið!